Nýggjur handil letur upp í Havn

HANDIL
Rannvá Danielsen
Jytta Drangastein

Tað er Anida Johannesen, ið eigur nýggja handilin, sum lat upp í gjár. Handilin eitur T.M Junior og liggur í Dr. Jakobsensgøtu 15. Tað er eisini Anida Johannesen, ið eigur handilin Benetton, sum nú víðkar virksemið við einum handli afturat.

Í mun til Benetton, sum hevur klæðir upp til 12 ár, fer T.M Junior at hava klæðir upp til 16 ár. Dentur verður lagdur á at hava góð, rúmlig gerandisklæðir úr bummull.

Høvuðsmerkini hjá T.M. Junior verða tað danska merkið Miller Junior og tað týska merkið Tom Tailor. Miller Junior er eitt nýtt danskt merkið, ið hevur fingið framúrskarandi góða móttøku í Europa við teirra klassisku barnaklæðum til gentur og nú eisini til dreingir í aldrinum 0 til 16 ár.

Tom Tailor er týskt og hevur eins og Benetton handlar runt um í øllum heiminum. Tom Tailor er serliga dámt fyri at vera frammi við tí síðsta nýggja til rímiligar prísir til børn frá 2 til 16 ár.

Umframt upplatingartilboð letur T.M. Junior 3 vinningar burtur. Øll kunnu koma inn í handilin útfylla eitt spurnarblað og vera við í lutakastinum um eina mountain bike, eitt rennihjól ella eitt gávukort frá T.M. Junior á 500 krónur. Drigið verður 6. oktober.

Anida bjóðar øllum at vera vælkomnan inn í sín hugnaliga handil.

Nógvar heimagjørdar vørur

Skóleistar
Troyggjur
Bundnaturriklæðir
Handskar
Vøttir
Hosur

Til hansara og hennara til stór og smá

Specialvørur til gávur. So sum silvurprýði, grindareiðskapsprýði, grindaknívar v.m.

Til føroyska búnan:
Mannfólkatroyggjur, hosur og hosubond
Konufólkatroyggjur, turriklæði og fyriklæði

ALV Sølubúðin
tlf. 313667

Hugnið um heimið við ljósketum

Bamboo
130,-

Gummihjørtur
149,-

Ríspapír lampa
199,-

Silva tvegg
391,-

Einar Mikkelsen Sp/F
Góðk. el-innleggjari
Bøgøta 12
Postboks 321 · FO-110 Tórshavn
Telf. 31 22 11 - Fax 31 07 45

Stór mótasýning í Platform í kvøld

- Í kvøld verður ein stór mótasýning í diskotekinum Platform í Havn. Málbólkurin í hesi sýning er tað yngra ættarliðið, og verður hon ikki sum mótasýningar flest.

MÓTI
Ingrid Bjarnastein

Í kvøld klokkan 22.00 verður ein mótasýning í Platform í Havn. Við eru ymsir handlar, og fara teir at sýna fram undirklæðir, mótaklæðir, ítróttaklæðir, skógvar og hár. Tað er Havgrímur Johannesen, sum eigur og rekur Platform, ið skipar fyri.

Hendan mótasýningin verður ikki sum mótasýningar plaga at vera. Tað verða fleiri pallar, ið verða stillaðir upp. Tað merkir, at talan er ikki um ein pall við einum frásøgumanni, sum vanligt er.

- Hendan mótasýningin verður meira nýmótans og nýskapandi, sigur Havgrímur Johannesen.

Handlarnir, ið verða við eru: Kallkyn, Mótaskálin, Skálabúðin (undirklæðir), Thomas Dam Ítróttur, Handilskjarnin (bæði mannfólka- og konufólkadeildin), Hon & Hann (klæðir og hár), Wrangler Shop, TM Junior, Salong Ása, Línbúðin (undirklæðir), Seytjan, Fljóðið og Fótbúni. Akkuleya og Trónd Hansen pynta inni í hølunum.

Atgongumerki á 50 krónur kunnu fáast í forsølu í omanfyrinevndu handlum og á Kunningarstovuni.

Atgongumerkini eru eisini galdandi til dansin, ið verður aftaná sjálva mótasýningina. Væntað verður, at sýningin kemur at varða um tveir tímar. Onki aldursmark er til mótasýningina, men til dansin verður aldursmark. Leggjast skal afturat, at tað er avmarka atgongd. Ikki seld atgongumerki verða seld við dyrnar.

Stuðlað mótasýningini hava: Føroya Sparikassi, Suðuroyar Sparikassi, Faroe Travel, Hotel Hafnia, Føroya Tele og Fotobúðin.

Gullhornið
hevur alt til øll
GULL-HORNIÐ
v/ L.E.H.N
Bringsnagøta 1 • Dandastova
FO-100 Tórshavn
Tel. 314430, heima 318361

Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk